# Jólakalendarin 2006

## Trøllapætur fer til handils



Trøllapætur fór hugaligur frá húsum at keypa ta seinastu gávuna. Uttanfyri trøllasmáttuna stóð omman og veitraði til hansara. Hon vildi heldur verða heima og stákast nú bert tríggir dagar vóru eftir til jólaaftan.

Tað hevði regnað illa seinastu dagarnar so hagin var vátur. Men Trøllapætur var í góðum gummiskóm og kendi hvønn bøkk og hvønn stein. Við bøgarðin sá hann oman á vakra jólatræið, sum lýsti upp í miðbýnum við øllum sínum perum. Nógvir bilar koyrdu eftir myrku vegunum og á handilsgøtuni hevði Trøllapætur ongantíð áður sæð so nógv fólk. Ja, nú stundaði til jóla og fólk og trøll vóru í rættuligum jólahýri. Nærum øll steðgaðu á og heilsaðu upp á Trøllapætur. Hinumegin vegin skrykti eitt barn í mammu sína, sum hevði fullan føvning av gávum og matvørum, og vildi sleppa til Trøllapætur.

Trøllapætur hugdi væl eftir bilunum og kvikaði sær yvir um vegin til drongin og mammuna, sum í øllum meldrinum royndi at finna bilin aftur.

Trøllapætur hevði ikki ætlanir um at keypa so nógv sum hendan konan við øllum pakkunum. Nei, hann skuldi inn í handilsbúðina "Reyða nøsin" at finna eitt smáting til Trøllabillu.

– Oy oy oy, sum her luktar væl .

Trøllapætur kendi angandi løgin av børkublómum, hvonnurt og harpeisi. Í handlinum stóðu alskins krukkur og gløs við myrru, smyrsli og rabarbukrem.

– Góðan dagin, Trøllapætur

Ein blíð og smílandi ung dama tók væl ímóti Trøllapæturi og spurdi hvat hon kundi hjálpa honum við.

– Eg vil fegin keypa onkran fína hársápu, sum ein trøllagenta skal hava.

Trøllapætur rodnaði eitt sindur, men blíða handilsgentan var von við eitt sindur av hvørjum. Serliga undan jólan, tá ið nógv fólk vitja handilin, eisini smæðin trøll.

– Ja, vit hava nógv sløg av hársápu, Trøllapætur. So hvat skal tað verða?!

– Her er sjampo til turt hár, hetta er til feittugt langt hár, so hava vit eisini til hár við flusi. Hesin dunkurin er til bleikt og litað hár. Ella skal tað vera til slitið hár? Hevur hon tunt ella tjúkt hár? Vit hava eisini balsam til bleytt og glansandi hár...

Trøllapætur var í villaeiði av øllum møguleikunum. Hann hugdi at hillunum og síðani at handilsgentuna.

– Hava tit onki sjampo til skitið hár. Ella okkurt sum luktar av frískum vetrarblómum?

– Vit finna eina snøgga fitta krukku við bestu hársápuni, sum vit hava. So verður hárið reint og fær ein deiligan anga.

Handilsgentan pakkaði ta reyðu væl angandi hársápuna inn og bant eina vakra sloyfu um gávuna og Trøllapætur takkaði fyri seg.

Ikki er altíð so lætt at vera trøll og eftirlíkna fínum fólki. Men ivaleyst fór Trøllabilla at gerast glað fyri gávuna.

Omman stóð í durunum, tá ið Trøllapætur glaður og móður kom aftur til trøllasmáttuna. Innkomin var hann skjótur at lata lúku 21 í jólakalendaranum upp. Og glómur vóru í trøllaeygum, tá ið myndin av vakra jólatrænum kom til sjóndar.








Vit ynskja tær eini góð og hugnalig jól

Tel 345600, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari